# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stórfingin vitjan

**Harra forseti**
Hjartaliga vælkomin til land okkara. Hetta, at tygum vitja okkara land, er ein heiður fyri okkum øll, sum her búgva. Vit halda, at tað er stórtøkið av tygum at taka tygum tíð til hesa vitjan, og tað skal ikki vera nakað loyndarmál, at vit vænta okkum sera nógv av vitjan tygara í allar mátar.

Land okkara er lítið, tá vit hugsa um landaøki, men taka vit hav okkara við er landið stórt. Havið er avgerandi fyri lív okkara her. Havið myndar støðið undir okkara búskapi, og alt okkara materiella lív og øll mentan okkara er dæmd av og treytað av tætta sambandinum við havið. Men havið er meira enn okkara lívsgrundarlag. Havið kring Føroyar – havið, ið fevnir Útnorður, hevur avgerandi týdning fyri veðurlagið í heiminum og fyri tær veðurlagsbroytingar, ið nú tykjast vera eygsýndar.

Er sjálvt landaøki okkara lítið, so er tjóðin, sum her býr, stór. Her hava vit búleikast í út við halvtannað ártúsund. Mentan okkara er sterk og sermerkt, runnin úr tí jørðildi, sum forfedrar okkara koma av, nevniliga av Vestlandinum í Noregi og úr keltiska mentanarøkinum fyri sunnan okkum, Írland, oyggjarnar fyri norðan Skotland.

Ein orsøkin til, at vit hava kunnað og framvegis kunnu liva her á nøkrum klettum mitt úti í Norðuratlantshavi, er at vit hava megnað at kombinera tað besta úr tí gamla siðbundna við alt tað nýggja, sum eyðkennir modernaða heimin í dag. Tann veruleiki, at vit hava varðveitt okkara mál og okkara gomlu mentan, samstundis sum vit taka til okkum alt tað nýggja, sum útheimurin bjóðar, hevur givið okkum styrki til at takla globalisering og internationalisering. Við okkara sterka samleika kunnu vit loyva okkum at taka globaliseringina til okkum. Vit meta globaliseringina sum eina avbjóðing við ótaldum møguleikum heldur enn sum eina hóttan móti mentan og búskapi okkara.

Vit halda í allari beskeðinheit, at vit hava ikki so lítið at bjóða heiminum. Tí ríka og framkomna heiminum kunnu vit bjóða eitt óvanliga reint hav- og landaumhvørvi. Vit liva í stóran mun av at framleiða mat, serstakliga mat úr havinum, sum jú er tiltikin sunnur matur. Vit byggja okkara matframleiðslu úr havinum á burðardygga veiðu og ein veiðihátt, sum er við at gerast fyrimynd



hjá øðrum fiskiveiðitjóðum. Hartil hava vit eina sera vakra náttúru við einum serstakliga ríkum fuglalívi. Vit hava okkara egna universtitet og eina røð av granskingarstovnum, sum øll virka á hægsta altjóða stigi.
Tað besta vit tó hava at bjóða er, at gestir uttaneftir kunnu møta okkum sum menniskju við tí sera ríku mentan og list, sum vit heldur enn fegin bjóða øllum heiminum at nýta gott av. Føroyar eru sostatt eitt land, sum hevur nógv at geva heiminum. Hartil kemur ein sera áhugaverd plasering í einum geografiskum øki, ið bæði sum nevnt hevur áhuga hjá klimagranskingini og annars hevur søguligan áhuga.

Undir kalda krígnum lógu Føroyar í einum havøki av stórum strategiskum týdningi fyri sovæl NATO sum fyri Warzawasamgonguna. Nú er Norðuratlantshavið vorðið eitt friðarinnar hav. Tað mátti tí verið upplagt, at ein komandi amerikanskur forseti tók stig til at lagt einhvønn altjóða toppfund í Føroyum.

**Harra forseti**
Tá tygum gjørdust forseti tørvaði demokratiska partinum av heiminum leiðslu í ólukkumát. Bæði sum guvernørur í Arkansas og sum forseti í heimsins sterkasta stórveldi sýndu tygum framúr leiðsluevni bygd á stórar visjónir fyri friði, demokrati og vælferð. Arkansas gjørdist undir tygara leiðslu ein av fremstu statum í USA. USA átók sær undir tygara leiðslu sum forseti bæði tann ómetaliga týðandi leiklutin sum verji fólkaræðisins og sum friðarskapandi og friðarvarðveitandi faktorur í heiminum. Eftirfylgjandi hava tygum nýtt nógva orku til tess at stríðast móti nógvum av teimum vansum og vandum, sum hótta heilsu og vælferð kring heimin.

**Harra forseti**
Tygum vitja heimsins elsta og minsta fólkaræði, hvørs parlament gongur heilt aftur til 825 eftir Krist. Vitjan tygara er ein stórur heiður fyri Føroyar og fyri føroyingar. Vit vóna, at tygum fara at gleðast yvir uppihaldið her, og at tygum fara at hava góð minni frá ferðini. Vit ynskja tygum góða eydnu og einaferð enn siga vit hjartaliga vælkomin til land okkara. Skuldi tað eydnast konu tygara Hillary Clinton einaferð at vitjað okkara vøkru oyggjar, so skal hon vera hjartaliga vælkomin. Vit fara eisini at nýta hetta einastandandi høvi at heita á tygum um at bera eina heilsan til tygara góða vin, Nelson Mandela og vegna Føroya fólk at bjóða honum at vitja friðsælu Friðaroyggjarnar í Norðuratlantshavi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.